# TILTØK

**Filadelfia, Landavegur 22**
Leygardagin kl. 17 Landsbøn. Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Evangel. møti við luttøku frá Lívsins Orð.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Heimasíða: www.filadelfia.fo

**Samkoman Lívdin**
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómstiltak, sum er fyri øll. Regin Guttesen fer at tala um: Hvussu vinni eg á undirlutakenslunum.
Sunnumorgunin í Hoyvíkar skúla, familjumøti kl. 10.30 Jákup Jacobsen talar um: Hvat segði Jesus um Himmalin? og tilbiðjanarmøti kl. 12 Høgni Johannesen talar um: 1. Kor. – Væntandi sjálvdisiplin. Barnaansing er undir báðum møtunum og sunnudagsskúli er kl. 12. Millum møtini er drekkamunnur.
Týskvøldið kl. 19.30 Bøn- og bíbliutími úti á Fløtum. Janus, Hallur og Høgni tosa um: Forfylging av teimum kristnu.
Heimasíða. www.livdin.fo

**Ebenezer**
Hóskvøldið kl. 20 heldur møtirøðin áfram við evninum: Efesarbrævið kap. 4-6.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møtirøð við evninum: Efesusbrævið kap. 4-6. Øll eru hjartaliga vælkomin. Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Rhema á Hálsi**
Mikukvøldið kl. 20 Húsmøti hjá Edith og Jónfinn Petersen, Leitisgøta, Argir
Fríggjakvøldið onki ATAP (Barnaklubbur).
Sunnudagin kl. 17 Møti og Sunnudagsskúli, Dánjal á Dul Jacobsen talar. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudagin kl. 15 Bønarmøti, kl. 17.30 Títlingasangur, kl. 19 Barnarøddir venja.
Hósdagin kl. 20 Heimaforbundið – fyri allar kvinnur.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Jóna.
Fríggjakvøldið kl. 20 After Eight.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Jógvan Steintún.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Hósdagin kl. 20 verður Taizé-kvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Martin de Leur í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.

**Meinigheitshúsið**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Regin Høgnesen.
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni fyri 6. fl. og eldri.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Ólavur í Mittúni Christiansen.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Immanuel**
Fríggjakvøldið kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Hósdagin kl. 19 Frítíðararbeiði.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting.
Mánadagin húsmøti hjá Fríðbjørn og Kristu.
Telefonandaktin 424 741.

**Mansstevna, Sørvágur**
Mansstevna verður í Sørvági í døgunum 14.-16. feb. Møtir og seminar verða í Missiónshúsinum, meðan stevnuluttakararnir gista og eta á Hotel Vágum. Nærri fæst við at ringja til Harald Haraldsen, tlf. 217506/314027.

**Missiónshúsið Libanon, Sørvágur**
Ungdómsmøti verður fríggjakvøldið kl. 20. Øll, frá 7. fl. eru hjartaliga vælkomin.
Sjómanskvinnuringurin kemur saman hóskvøldið 6. feb. kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Thabor, Fuglafjørður**
Hósdagin kl. 20 Regin Olsen talar, Manskórið í Meinigheitshúsinum syngur.
Fríggjadagin kl. 16 Barnamøti, kl. 20 talar Sylverius Jacobsen, Effata av Strondum syngur. Innsavnan til ytrimissión.
Leygardagin kl. 9.30 Morgunbreyð, Bíbliutími við Sverra Kass. Evni: »Berið byrðar hvør hjá øðrum«, kl. 16 Barnamøti, kl. 20 talar Olaf Magnusen, Streingakórið í KFUM og K syngur, kl. 22.30 Ungdómsløta, Christian Joensen talar, Lovsangs- og vitniløta.

**Lívsins Orð**
Tim 5 verður í dag kl. 17.30 og Bøn fyri kvinnur kl. 19. Barnamøti verður fríggjadagin kl. 17.15. Møti verður sunnudagin kl. 10.30. Ungdómsmøti verður mánakvøldið kl. 20.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Arna Abrahamsen.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 11 Barnamøti, kl. 19 Evangel. møti. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Jóhan Petur Johannesen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 11 Barnaarbeiði (3) 4 til 6 ár. kl. 14 Barnaarbeiði 1., 2. og 3. flokkur, kl. 16 Barnaarbeiði 4., 5. og 6. fl. kl. 20 Evangel. møti uppi í Samljóð við Svenning á Lofti.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti við Svenning á Lofti. Verið hjartaliga vælkomin.

**Samljóð, Skopun**
Leygarkvøldið kl. 20 Evangel. møti við Svenning á Lofti. Verið hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Karl og Elidu Kenning.
Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Í kvøld kl. 19 Juniorsoldatmøti.

**Møtiskrá hjá føroyska trúboðaranum í DK**
5. feb. í Skarild missiónshúsið kl. 19.30.
6. feb. í Gårde missiónshúsið kl. 19.30.
10.-16. feb. í Dronningslund missiónshúsið, hvørt kvøld kl. 19.30.
17. feb. í Finnerup missiónshúsið kl. 19.30.

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Tilhaldið í Sandoynni**
Opið er mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Drekkamunnur er at fáa báðar dagarnar. Á skránni er upplestur, sangur, spøl, prát o.m.a. Øll eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319130/61 655400.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 3. februar*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Ítriv
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, telving og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan mikud. og fríggjadag tlf. 316491.
**Hósdagin 13/2 verður skeið í mynsturtøving við nálum. Tilm. 316491**
*Týsdagin 4. februar*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 **Kolagrevstur**. Steingrím Niclasen
*Mikudagin 5. februar*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou.
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15 Túrur – sjá skránna í bløðunum
*Hósdagin 6. februar*
kl. 10.30-11 Fimleikur Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 7. februar*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði – høvi er at koma sum gestur
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

**Frá felagnum Pinkubarnadeyði**
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.








# Kathy skal venja Westlife

**Mong minnast óivað countrysangarinnuna Kathy Chiavola úr Nashville, sum vitjaði fyrstu Listastevnuna. Væl umtókti írski dreingjabólkurin Westlife fer nú undir at syngja country og Kathy verður teirra ræddarvenjari og skal eisini syngja**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Kathy Chiavola vitjaði fyrstu Listastevnuna. Ein verulig countrystjørna úr Nashville, sum eisini hugtók føroyskar lurtarar.

Írski bólkurin Westlife er farin í countryídnaðin og er í løtuni í Nashville, har teir taka upp. Kathy hevur fyri BBC fingið uppgávuna at vera ræddarvenjari.

Daytime Frinds and Nihgttime lovers er heitið á fyrsta countrysanginum hjá Westlife. BBC filmaði hendingina og tey, sum síggja fremmandar sjónvarpsræsir, kunnu óivað brátt síggja úrslitið, ið varð framt undir kønari leiðslu av Kathy Chiavola. Hon syngur eisini kór og allar tær høgu røddirnar.

Útvarpsstøðir á staðnum hava fingið atgongd til upptøkurnar og írsku poppdreingirnir hava verið sera væl umtóktir í Nashville. Eittnú á Wildhorse Saloon, har teir saman við Kathy Chiavola sungu fyri fullum húsum.

- Eg kenni meg sum fimta Beatle'in, segði ein ovurfegin Kathy í viðtali fríggjadagin. Eini sangarin í bólkinum skuldi verða pápi og fór heim, og tí kom Kathy við í bólkin.



*Kathy Chiavola avmyndað, tá Sosialurin hitti hana á Hotel Føroyum, tá hon vitjaði Listastevnuna*
*Mynd: D. Olsen*



*Kathy Chiavola og bólkur hennara framføra á fyrstu Listastevnuni, her avmyndað í Fuglafirði*
*Mynd: D. Olsen*

# Stórar kanónir á Jackways

**Føroyska dansistaðið fer nú undir nýtt tiltak fríggjakvøld, tá nakrir av fremstu DJ's í Danmark fara at spæla tónleik**

BÝARLÍV
*Jákup Mørk*

Á nú einasta føroyska dansistaðnum í Keypmannahavn plaga føroyingar vanliga at hittast, tá farast skal í býin. Tað vil siga, at hetta er staðið leygarkvøld, tí fríggjakvøldini hava verið nakað misjøvn, síðani dansistaðið lat upp.

At byrja við var opið sum vanligt fríggjakvøld, men lítla undirtøkan gjørdi, at leiguavtala varð gjørd við ein sonevndan klubba um, at tað fyrst og fremst vóru limirnir hjá hesum, sum høvdu atgongd fríggjakvøld.

## Schhh!

Sum so hava fríggjakvøldini gingið hampuliga væl síðani, men nú verður so ein roynd gjørd at peppa hesi nakað upp. Framyvir verður tað nevnliga so, at friggjakvøld verður Jackways umdoypt til »schhh!«. Men tað merkir tó ikki, at talan verður um nakað friðarligt stað.

Her verður nevnliga talan um eitt stað, har fleiri av kendastu plátuvendarunum í Danmark fara at undirhalda gestunum. Talan er um nakrar danir, sum áður hava hildið til á Papa Hotel og Cavi, men eftir at hava sæð hølini hjá Jackways í Hausergade eru teir komnir eftir, at tað er júst her, teir skulu vera.

Tónleikurin sum framyvir kemur at verða spældur fríggjakvøldini er fyri tað mesta tónleikur, sum er uppi í tíðini í danska høvuðsstaðnum. Lounge, down-beat, electro-pop og house kunnu nevnast, og vyirhøvur fer tað helst at vera so, at hetta fyri tað mesta er tónleikur til yngra ættarliðið.

Suni Skylv Reinert, sum er ein av eigarunum á Jackways sigur annars, at talan vanliga verður um fleiri plátuvendarar hvørja ferð, soleiðis at fjølbroytni í tónleikinum verður so stórt, sum tilber. Eftir eitt slag av einum royndarkvøldið seinasta fríggjadag, verður Schhh! sent av barkastokki nú fríggjakvøldið, tá navnframi Tom Clark úr Berlin fer at velja tónleikin. Av øðrum plátuvendarum, sum fara at leggja leiðina framvið kunnu eitt nú eisini nevnast Keld Tholstrup ella Krede og eisini kemur Thomas Madvig, sum er kendur úr MTV at vitja okkurt kvøldið.

At enda leggur Suni afturat, at nýggja tiltakið fríggjakvøld ikki kemur at hava ávirkan á leygarkvøldini. Tá verður talan framvegis um ein breiðan málbólk, eins og atgongumerkjaprísurin verður verandi á 50 krónum. Hann er annars 70 krónur fríggjakvøldini. Ætlanin er so eisini, at hava nøkur café kvøld seinni í vár, eins og tað sjálvandi verður skipað fyri serstøkum tiltøkum, tá FCK og Brøndby fara at bresta saman í vár. Nakrar uppgerðir, sum nú kanska fara at telja tveir føroyskar leikarar.

# Gávugóðs úr Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum

TÍÐINDASKRIV

Hósdagin 6. februar klokkan 14. verður triðju ferð gávugóðs latið úr Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum.

Endamálið hjá grunninum er at stuðla og eggja ungum fólki við listarligum hegni til útbúgving.

Thorvald Poulsen av Steinum var gartnari í Havn. Hann hevði stóran áhuga fyri bókmentum og list, og hann stovnaði grunnin, sum ber navn hansara.

Nevndin í grunninum er mannað við rektaranum á Fróðskaparsetrinum, sum formanni, formanninum í LISA og formanninum í lærara-felagnum. Tey eru í løtuni, Malan Marnersdóttir, Oddfríður Marni Rasmussen og Elsa Birgitta P. Petersen.

Gávuðgóðsi var fyrstu ferð latið í 2001, tá fekk listakvinnan Rannvá Kunoy 60.000 krónur úr grunninum. Í fjør fingu 3 listafólk gávu úr grunninum. Trombone spælarin Andrass Olsen fekk 60.000 krónur, filmsleikstjórin Teitur Árnason og rithøvundurin Petur Elias Askham Guttesen fingu hvør sínar 25.000. krónur

Handanin verður á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum, V. U. Hammershaimbs gøta 16, kl. 14.


**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**




Hósdagin 06.02. kl. 18⁰⁰
Hósdagin 06.02. kl. 22³⁰




Hósdagin 06.02. kl. 20⁰⁰




Hósdagin 06.02. kl. 19⁰⁰




Hósdagin 06.02. kl. 21³⁰
– *Seinasta sýning*

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning**
Fríggjadagin 07.02. kl. 17⁰⁰
Fríggjadagin 07.02. kl. 18⁴⁵




**Frumsýning**
Fríggjadagin 07.02. kl. 20³⁰
Fríggjadagin 07.02. kl. 23⁰⁰

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**